

*- Vit hava longu umsóknir til øll hesi 37 grundøkini, sigur Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun. Hyggur ein eftir umhvørvinum og útsýninum, so skilir ein hví so er!*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Skopun: Stykkja út til framtíðina

**Enn dugir eingin at siga, nær ætlaði undirsjóvartunnilin til Sandoynna kemur. Hetta forðar kortini ikki Skopunar kommunu í at fyrireika seg uppá eina sanna innrás av fólki. Nógv ynskja nevniliga at búseta seg her, og tí verður í løtuni gjørt klárt til sløk 40 grundøki**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skopun:** - Eingin orsøk er at sita hendur í favn og bert bíða eftir undirsjóvartunlinum.

- Vit mugu fyrireika okkum uppá hann og uppá tey krøvini, sum hann fer at seta okkum. Her má okkurt henda!

Nøkurlunda soleiðis tykist støðan at hava verið í bygdarráðnum í Skopun, nú fólk og myndugleikar av álvara vóru farnir at tosa um fast samband við meginlandið.

Eitt úrslit av hesum framskygni sæst týðiligur farvegur eftir í bygdini í dag. Norðarlaga í bygdini eru menn nevniliga í ferð við eina rættiliga stóra og umfatandi útstykking í hesi bygdini sum í dag telur beint undir 500 fólk.

Onkur vil kanska halda at her verður tikið ov rívan til. Men so er ikki, sambært borgarstjóranum Gerhardi Lognberg:

- Vit hava í roynd og veru nóg mikið av umsóknum til øll hesi grundøkini, sigur hann við Sosialin.

Ikki kann tí sigast annað enn, at bygdin í framtíðini fer at mennast og vaksa enn meiri.

Samstundis við hetta eru longu og verða gjørd arbeiðir fyri at bøta um umstøðurnar hjá barnagarðinum og skúlanum í bygdini.

### Positivar avleiðingar

Norðarlaga í bygdini eru áður framdar stórar útstykkingar. Her sær ein í dag hópin av sethúsum sum eitt úrslit av hesi menningini av bygdini.

Nú stendur næsta stigið fyri í hesum sambandi, - eitt stig har bygdarráðið veruliga ynskir at standa tilbúgvið til tær positivu avleiðingarnar og tí avleidda virkseminum av fasta sambandinum við umheimin.

Henda útstykkingin verður í roynd og veru gjørd í tveimum: Onnur við 25 økjum og hin seinna við 12 økjum. Íalt verður tí talan um 37 økir, har fólk kunnu seta búgv í í framtíðini.

- Í løtuni gera vit tey 25 fyrstu klár. Tey seinastu 12 liggja omanfyri vegin, og har er ikki so nógv at gera við tilbúgvingini, sigur Gerhard.

### Draga fólk til bygdina

Fyri Gerhard og hinar limirnar í bygdarráðnum hevur tað havt alstóran týdning at vera fyrireikað uppá framtíðina.

- Vit vita, at undirsjóvartunnilin ikki er langt burtur. Og her er tað neyðugt hjá okkum at vera uppá forkant við menningina.

- Við hesi útstykkingini vóna vit tí at kunna draga so nógv fólk aftur til bygdina sum yvirhøvur gjørligt. Soleiðis kunnu vit verða enn fleiri at lyfta tær uppgávur sum eru í bygdini, sigur hann ikki sørt bjartskygdur.

Nógv teirra, sum hava ætlanir um at búseta seg her í Skopun, eru fólk sum eru úr bygdini, ella sum á einhvønn hátt hava tilknýti til bygdina.

Áður kundi ein hildið, at Sandoyggin lá meiri at kalla burtur frá meginøkinum. Men soleiðis er ikki í dag, og soleiðis verður heldur ikki í framtíðini.

Tað er tí rætt sum Gerhard Lognberg sigur:

- Um nøkur ár fáa vit ein undirsjóvartunnil. Og tá verða vit eisini ein partur av meginøkinum!

## 12 km. langur tunnil

At Skopunar kommuna er farin undir eitt so stórt stig við útstykkingini er ein fylgja av ætlanini við undirsjóvartunlinum millum Streymoy og Sandoy.

Forkanningarnar av hesi ætlanini eru longu farnar í gongd. Í summar er seismikkur skotin í Skopunarfirði, og verða úrslitini nú viðgjørd av kønum fólki.

Eftir ætlan verður tunnilin einar 12 kilometrar langur. Samlaða prosjektið fer at taka eini átta ár og fer væntandi at kosta millum 600 og 800 mió. kr.

Í ár eru játtaðar 5 mió. kr. til forkanningar.

**sb.**